LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Avloysari fyri fulltrúa

Við hesum verður eitt fyribilsstarv sum barnsburðaravloysari fyri fulltrúa á Løgmansskrivstovuni lýst leyst at søkja.

**Høvuðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar eru at gera lógarsmíð á teimum økjum, ið verða umsitin av løgdeildini, gerð av løgfrøðiligum responsa, eftirkanning av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og aðrar løgfrøðiligar uppgávur t.d. menning og samskipan av lóggávuarbeiðinum í miðfyrisitingini.

**Fakligar førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Setanarskeið**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Setanin varir til 31. mars 2001.

**Løn og setanartreytir**
Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya.
Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra, tlf. 351010.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

**Løgmansskrivstovuni**
**Tinganesi**
**Postsmogu 64**
**110 Tórshavn**

og skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. september 2000 kl. 15.00.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur sum landsstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

# Tórshavnar Musikkskúli

Pláss er fyri næmingum, 10 ár ella eldri, til fagott at byrja beinanvegin.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 31 32 17 millum kl. 09.00 og kl. 20.00.

# Maskinmeistari
## søkist til til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari á Sundsverkinum er leyst at søkja.

Við tað at Sundsverkið er í rakstri alt samdøgrið alt árið krevur starvið, at viðkomandi er til reiðar bæði á átaka sær alt vanligt dagligt viðlíkahaldsarbeiði í samstarvi við manningina á Sundsverkinum annars, og eisini at luttaka sum hjálparmaður (2. maður) á vakt uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Tað er ikki eitt krav, at viðkomandi hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, men kundu vit hugsað okkum, at umsøkjararnir hava í minsta lagi tvey ára maskinmeistaraskúlaprógv ella javnbjóðis førleika. Royndir innan maskinmeistarayrkið eins og full maskinmeistaraútbúgving geva umsøkjarum fyrimun.

Lønin verður sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið í 3. lønarflokki.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Osvald Hansen, verkmeistara á Sundsverkinum ella til Bjarka Hermansen ella John P. Danielsen á skrivstovu okkara í Havn, telefon 311366.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 27. september 2000.

*Tórshavn, tann 5. sept. 2000*

Elfelagið SEV

# Sølufólk søkist

Vit sóknast eftir sølufólk til gólvdeild okkara í Vøruhúsinum á Hjalla. Eru spurningar hesum viðvíkjandi, kunnu tygum venda tygum til deildarleiðaran, Sólbjørn Thomsen, tlf. 342500.

Skrivlig umsókn í seinasta lagi mánadagin 11.9.2000.



**Vøruhúsið á Hjalla**
Postboks 1019
110 Tórshavn

# Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag (FNU)

Aðalfundur felagsins verður á Hotel Hafnia **sunnudagin hin 24. september, kl. 16.**
Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

Toll- og Skattstova Føroya, Sandoyar Øki

# Starv í Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan 1. oktober 2000.

**Arbeiðsuppgávur**
Avgreiðsla og ráðgeving í tolli, avgjøldum, meirvirðisgjaldi, skatti og stuðulsskipanum v.m. Harumframt bókhald og inkvirering av skipum.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal í minsta lagi hava HH-útbúgving ella líknandi prógv, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Í sambandi við vaktarskipan eftir vanliga arbeiðstíð krevst, at umsøkjarin býr í Sandoynni.

**Setanarviðurskiftir**
Løn og setanarviðurskiftir eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu sendast innan **16. september 2000** til

**Toll- og Skattstova Føroya**
Sandoyar Øki
240 Skopun

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki á tlf. 36 15 88.

***Um stovnin***
*Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Sandoyar Øki starvast 3 fólk.*

# Søkt verður eftir dagrøktarmammum

Í sambandi við at skipað verður fyri dagrøkt í Sumbiar kommunu, verður hervið søkt eftir dagrøktarmammum.

Umsóknirnar mugu vera bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi tann 15. september 2000.

**Sumbiar kommuna**
Tlf. 370344 og fax 370114

# Útróðrarbáturin

M/B Havfarið til sølu.

**Tlf. 457735** ella **220086**



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2414,
**P/F Eimskip í Føroyum, 100 Tórshavn.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Svavar Ottósson, Bjarnoyarvegur 15, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Linda Bjørk Gunnlaugsdóttir, Ægishædd 6, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 6. september 2000

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2383,
**P/F Vestland, 900 Vágur.**

**Vi›tøkur broyttar:**
14.06.2000
**N‡tt navn:** Sp/f Vestland
Lækkan av P/F-peningi vi›tiki› 28.01.2000 er nú gjøgnumførd.
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Barbara Frí›bjørg Hansen, Millum Gilja 42, 188 Hoyvík.
Innkomin í nevndina: Jákup Joensen (Y), 900 Vágur.

Skráseting Føroya tann 5. september 2000

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 517,
**P/F Leif Niclasen, 450 Oyri.**

**Vi›tøkur broyttar:**
23.05.2000.
**Nevnd:**
Innkomin í nevndina sum næstforma›ur: Agnes Bundgaard Niclasen, 450 Oyri.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og útleiguvirksemi.

Skráseting Føroya tann 6. september 2000

Kristin Balle

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

# Kunningar- og samskiftisfólk

Eitt hálvtíðarstarv innan kunning og samskifti er leyst at søkja til setan frá 1. oktober ella skjótast til ber. Arbeiðsstaður er setursskrivstovan, men arbeiðsuppgávurnar fevna um alt Fróðskaparsetrið.

**Arbeiðsuppgávur**
Tann, ið verður settur í starv, skal m.a.:
- gera upplýsandi tilfar um Setrið til almenning og studentar innan- og uttanlands
- skipa fyri tiltøkum av ymsum slag

Størsti denturin verður lagdur á at gera tilfar til og røkja heimasíðu okkara.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving innan kunning, marknaðarføring, journalistikk ella góðar royndir innan tílíkt arbeiði
- Skal duga væl at skriva á føroyskum, donskum og enskum
- Skal hava royndir í heimasíðuforritan
- Skal vera skapandi, duga at taka ímóti hugskotum og fremja tey í verki
- Skal hava evni at samstarva tvørfakliga

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og avvarðandi yrkisfelag. Fyrsta ár er royndarár.

Umsókn við yvirliti yvir starvsroyndir, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu stílast til setursskrivaran og vera Fróðskaparsetrinum í hendi innan 15. september 2000. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Setursskrivstovuna tlf. 31 53 02.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
Handan Á 5
100 Tórshavn
annikajo@fsf.fo
www.sleipnir.fo/setur

# Fimleikafelagið Støkk

**Vit byrja fimleikin aftur mánadagin 11. september. Ár 2000**

**Kostnaður fyri hvørja hálvu:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1.-4. fl. | kr. 125,00 | Foreldur & børn | kr. 200,00 |
| 5.-8. fl. | kr. 150,00 | Vaksin (17 ár og eldri) | kr. 250,00 |
| 9.-10. fl. | kr. 200,00 | Børn 5-6 ár | kr. 125,00 |

***Venjingartíðir í Støkkhøllini***

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|---|
| **Kl. 15.00-16.30** Gentur 3. fl. Anna/Anita | **Kl. 16.00-17.30** Dreingir 2.-3. fl. ??? | | **Kl. 15.00-16.30** Dreingir 1. fl. Tóra | **Kl. 15.00-16.30** Dreingir 4.-5. fl. Áki | **Kl. 13.00-17.00** Reiðskap Úttøkulið Gentir & Dreingir |
| **Kl. 16.30-18.00** Gentur 2. fl. Lív/Linda | **Kl. 17.30-19.00** Foreldur & børn Ingun/Eybritt | **Kl. 16.30-18.00** Reiðskap Eldri G. Marjun | **Kl. 16.00-17.30** Gentur 1. fl. Elsa/Durita | **Kl. 16.30-18.00** Stórkap. Pinkur Erla | |
| **Kl. 18.00-19.00** Børn 5-6 ár Margretha | **Kl. 19.00-20.30** Reiðskap Eldri G. Marjun | **Kl. 18.00-19.30** Reiðskap Úttøkulið G. Durita/Marit | **Kl. 17.30-19.00** Gentur 6.-7. fl. Elsa/Mirjam | **Kl. 18.00-20.00** Reiðskap Eldri G. Marjun | |
| **Kl. 19.00-20.30** Gentur 9.-10. fl. Sigrun/Selma | | **Kl. 19.30-21.00** Kvinnur Eva | **Kl. 19.00-20.30** Gentur 8. fl. Oluffa/Anna | **Kl. 20.00-21.30** Dreingir 6.-10. fl. Heri | |
| **Kl. 20.30-22.00** Vandar kvinnur ??? | | | | | |

***Venjingartíðir í Glyvra skúla***

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|---|
| **Kl. 16.00-18.00** Úttøkulið smágentur Rannvá | **Kl. 17.00-18.30** Gentur 4. fl. Elin | **Kl. 16.00-17.30** Úttøkulið 6. fl. Johanna/Johanna | **Kl. 16.30-18.00** Gentur 5. fl. Lív/Sarita | | |
| **Kl. 18.00-19.00** Motiónskvinnur Sveiney | **Kl. 20.30-22.00** Kvinnur 17-20 ár Dagbjørt | | | | |

# Virkisbygningur til sølu

Virkisbygningurin hjá P/f Langasandur Timburhandil í Kollafirði, sum stendur á matr. nr. 236, sum er ogn, verður hervið lýstur til sølu um hóskandi boð fæst.

Eisini verða ein Mercedes Benz 2531 Actros lastbilur við 14,5 t/m krana, ein Mercedes Benz Sprinter 300 lastbilur og ein Linde trukkur 3,5 tons lýstir til sølu um hóskandi boð fæst.

Eisini nakað av plattareolum, lagurreolum og handilsinnbúgvi verður selt.

**P. F LANGASANDUR TIMBURHANDIL**
**Tlf. 421010 og 286010 · Fax 421392**

